

11. novembur skal aftur avgerðast, hvør skal hava sæti í býráðnum í Havn

# Vit hava nokk av pengum

**– Tað stendur væl til fíggjarliga í Tórshavnar kommunu, so eg dugi als ikki at síggja, hví vit skulu smekka kassan í, sigur Heðin Mortensen, sum leggur afturat, at tá tíðirnar gerast verri, má kommunan skapa virksemi**

KOMMUNUVAL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í mun til Høgna Mikkelsen, metir borgarstjórin í Havn, at tað nokk skal bera til at gera tær íløgurnar, ið standa fyri framman.

– Kommunan hevur onga skuld. Onki er lænt og tí meti eg als ikki, at vit skulu byrja at spara, tá tað gongur seinni í samfelagnum, sigur javnaðarmaðurin. Hann leggur afturat, at fólkagrundarlagið ger nógv fyri, at kommunan hevur rímiligar fíggjarligar karmar, men fíggjarlógin verður lækkað eitt sindur, fyri at tryggja seg eitt sindur.

Sitandi borgarstjóri er eisini sannførdur um, at teir hava gjørt tað rætta við at økja um umsitingina, sum hann tó ikki metir skal vaksa meira.

– Tá vit byrjaðu í hesi samgonguni, var umsitingin alt ov lítil. Fólkini høvdu alt ov nógv at gera, og bíðilistarnir vóru so ótrúliga langir, tí ongin umsiting var at taka fatur í tað. Men nú er umsitingin sum hon skal vera, so hon verður nokk heldur ikki vaksin, greiðir borgarstjórin frá.

## Hava gjørt alt tey skuldu

Borgarstjórin í Havn metir ikki, at tey hava klandrast so illa í samgonguni. Hinvegin metir hann, at tað hevur verið sera friðarligt.

– Vit hava fingið øll tey málini ígjøgnum, sum samgongan setti sær fyri. Í mun til undanfarnar samgongur, har øll hava kunna fylgt við klandrinum í bløðunum, so hevur tað ikki verið soleiðis hjá okkum. Hini málini, har vit ikki hava verið samd, eru mál, sum hava stungið seg upp brádliga, og mann kann sjálvandi ikki geva fólkið munnkurv og tí eru fólk ikki altíð samd, greiðir Heðin Mortensen frá. Hann nevnir eisini, at fíggjarlógin er samtykt við fyrstu viðgerð.

## Klár at halda fram

Heðin Mortensen metir, at núsitandi samgonga hevur góðan møguleika at halda fram, og hon skal í gongd við nógv onnur mál.

– Vit nýta og hava nýtt nógva orku til ítrótt og skúlar. Hesi hava nú fingið tað mesta av tí, ið krevst fyri ein høvuðsstað, so nú koma vit til næstu málini, tað verður serliga tónleikurin og tey eldru, sigur Heðin Mortensen.



Heðin Mortensen metir, at samgongan, ið situr, hevur góðan møguleika at halda fram

# Vit hava ikki ráð til alt



Høgni Mikkelsen er sannførdur um, at broytingar skulu gerast í býráðnum, so meiri stýring verður við øllum

**Sambandsmaðurin, ið hevur sitið í andstøðu seinastu fýra árini, øtast um stýringina hjá samgonguni, har oyðsl og ósemjur hava verið afturvendandi, heldur hann**

KOMMUNUVAL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Sambært Høgna Mikkelsen, ið hevur sitið í andstøðu seinastu fýra árini, hevur staðið heilt illa til í samgonguni hetta valskeiðið.

– Vit hava sæð eina umsiting, sum bara er vaksin og vaksin. Tað ber ikki til, og tað merkist at borgarstjórin hevur koyrt solospæl, tí hava tey í samgonguni havt trupulleikar at semjast, sigur Høgni Mikkelsen. Hann leggur afturat, at hann heldur tað vera løgi, at í øðrum støðum siga tey fólki úr starvi, meðan umsitingin hjá kommununi bara veksur.

Eisini metir sambandsmaðurin, at tað als ikki ber til at gera tær útbyggingar, ið liggja í kortinum hjá sitandi samgongu.

– Vit mugu hugsa um, at tíðirnar ikki eru sum tær hava verið, og tí kunnu vit ikki rokna við at kunna byggja tað flottasta av tí flottasta. Vit mugu heldur nýta peningin har hann ger mest nyttu, heldur enn at oyðsla, so vit fáa dýrar arkitektar, fortelur Høgni Mikkelsen, sum eisini heldur tað vera løgi at byggja so nógv nýtt, tá mann als ikki fylgir upp og finnur útav hvat eldru bygningarnir skulu nýtast til.

## Okkum mangla grundstykkir

– Ítrótturin hevur fingið alt ov nógv. Onki hevur verið gjørt fyri at útvega grundstykkir, og tað er ein stórur trupulleiki og tey, sum eru ávegis eru alt ov dýr. Eisini er tað sera løgi, at mann knappliga, so stutt fyri valið, skal seta spakan í til eina fimleikarhøll. Tað kann mann næstan síggja sum beinleiðis valagn, sigur Høgni Mikkelsen. Sum heldur tað vera løgi, at ítrótturin hevur fingið so nógv, og onnur so lítið.

## Skal rudda upp

Sambandsmaðurin metir tó, at upprudding verður gjørd til valið. Tí hann ætlar sær at syrgja fyri at ikki meiri peningur verður nýttur enn neyðugt.

– Vit mugu syrgja fyri at lata vera við at seta fleiri fólk í umsitingina. Samstundis mugu vit eisini royna at fáa skil uppá at hava greiðar og konkretar ætlanir við tingunum vit gera, so skil verður á, sigur Høgni Mikkelsen. Hann greiðir eisini frá, at hann heldur tað vera so løgi, at samskifti við kommununa er so tungt, og at hetta skal broytast.